

**FRAMHALD**

*KÍ-kvinnurnar halda fram, har tær sleptu í fjør, og við 3-0 sigrinum á AB í gjárkvøldið vístu tær, hvat tær ætla í ár eisini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# AB gjørdi einki við KÍ

**1 DEILD KVINNUR** Klaksvíkskvinnur sótu á øllum í seinna hálvleiki og vunnu uppiborið á AB, sum var væl við at byrja við, men misti pippið eftir steðgin

**Hilmar Jan Hansen**

At KÍ fekk tvey mál síðsta korterið av fyrra hálvleiki, fekk helst avgerandi týdning fyri, hvussu oddadysturin í bestu kvinnudeildini í gjárkvøldið endaði. AB, sum hevði verið væl við og havt onkran góðan kjans fyrsta hálva tíman, fór mestsum púra burtur í einki, tá KÍ var komið framum.

Fyrsta málið kom eftir hálvan tíma, tá Rannvá Andreasen fór ígjøgnum verjuna hjá AB og spældu Sofiu Purkhús púra leysa inn fyri málinum, og beint fyri hálvleik kom KÍ upp á 2-0 eftir hornaspark, sum Sigrid Jacobsen skallaði ímóti málinum, men Sofía prikaði tað síðsta pettið inn.

Henda skelkin, at koma afturum við tveimum málum ímóti KÍ, megnaði AB ongantíð at rista av sær. Hóast tað nógva gekk fyri seg á miðjuni og bæði lið stríddust væl, var tað KÍ, sum hevði tamarhald á tí nógva. Serliga í seinna hálvleiki var lítið um AB, ið ongantíð ordiliga megnaði at hótta vertirnar.

AB-kvinnur fingu tó víst, at tær eru einasti veruligi avbjóðarin hjá KÍ, men í gjárkvøldið lá ov illa fyri at skapa neyðugu málkjansirnar. Tann parturin bilaði ikki hjá KÍ, sum saktans kundi vunnið meira, tí eitt nú endaðu tvær royndir á málrammuni hjá AB.

Síðsta málið skoraði Malena Josephsen við einum langskoti tríggjar minuttir fyri tíð, og so kundi staðfestast, at KÍ í øllum førum er omaná, nú kvinnukappingin júst er farin í gongd. Spurningurin er so, um AB onkra aðru ferð kann hótta meira, enn liðið megnaði í gjárkvøldið – í øllum førum er neyvan hugsandi, at nakar annar kann gera tað.

Hinir báðir kvinnudystirnir, ið blivu útsettir annan páskadag, verða spældir í annaðkvøld klokkan 18. Tá tekur MB ímóti Skála og EB/Streymur tekur ímóti Víkingi.

*einslistir@kallnet.fo*



**GRØNUR VENJARI**

*Eftir eitt sabbatár frá venjingini, er Henrik Gerster aftur komin á vøllin, nú sum mansvenjari hjá Kyndli næstu tvey árini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Gerster til Kyndil

**HONDBÓLTUR** Kyndil, sum vann silvur í bæði lands- og steypakappingini hjá monnum, hevur gjørt sáttmála við Henrik Gerster, sum komandi tvey árini skal venja besta mansliðið hjá felagnum

**Hilmar Jan Hansen**

Tað var í gjár, at Kyndil almannakunngjørdi nýggja venjaran, Henrik Gerster, sum síðst vandi kvinnurnar hjá Stjørnuni, har hann vann tvey meistaraheiti og tríggjar steypakappingar í trý ár. Undan tí hevur hann eitt nú vant menninar hjá H71.

– Kyndil er mest vinnandi felag í føroyskum manshondbólti, og eg eri sera fegin um at fáa møguleikan at venja fyrst manslið hjá felagnum, sigur Henrik Gerster við heimasíðuna hjá Kyndli.

– Vit fara at leggja dent á at skapa úrslit og samansjóða teir royndu spælararnar og tey mongu talentini, ið eru á veg. Kanska eisini onkur spælari kemur aftrat.

Hjálparvenjari hansara hesi tvey árini verður Hjalmar Klein Olsen, sum eisini hetta kappingarárið hevur verið hjálparvenjari hjá Kyndli, umframt at hann hevur vant unglingar og dreingir 17 hjá felagnum.

Dia Midjord, sum hevur verið mansvenjari hjá Kyndli síðstu trý árini, ynskti ikki at halda fram, og tí valdi Kyndil at fara eftir Gerster, sum annars hevur hildið frí frá hondbóltinum í vetur.

*einslistir@kallnet.fo*

# Talentvenjing fyri smágentur

**GENTUFÓTBÓLTUR** Tríggjar fótbóltskvinnur hava tikið stig til at hava talentvenjing við tilsamans 15 spælarum í aldrinum 12-14 ár. Fyrsta venjingin verður á Eiði mánakvøldið

– Vit hildu tað vera spell, at eingin talentvenjing eisini var fyri gentur, og tá Fótbóltssambandið ikki hevði tað á skránni, tóku vit bara sjálvar stig til tað, sigur Hanna Olsen, sum sjálv triðja kemur at standa fyri talentvenjingini. Hinar báðar eru Ingun Hansen og Sunnuva Vesturdal, og tær tríggjar sita eisini allar í kvinnunevndini hjá Fótbóltssambandinum.

– Tá vit fyrr hava eftirlýst talentvenjing fyri gentur, hevur undanførslan verið, at tað var ov torført at finna vøll til slíka venjing. Men tað er nokk bara í Havn, at tann trupulleikin er, so tí byrja vit bara sjálvar við talentvenjing í Eysturoynni.

Ætlanin er at hava gentur í aldrinum 12-14 ár til talentvenjing eina ferð aðru hvørja viku, og fyrsta venjingin verður á Eiði mánakvøldið frá klokkan 17.30 til 19, og ætlanin er so at skifta millum vøllirnar á Eiði, Skála og í Gøtu.

– Vit fáa fimm spælarar úr EB/Streymi, fimm frá Skála og fimm úr Víkingi við til fyrstu venjingina, og so fáa vit at síggja, hvussu hildið verður fram, sigur Hanna Olsen.

– Ætlanin er at taka út av nýggjum fyri hvørjar tríggjar venjingar, so eisini aðrir spælarar kunnu sleppa framat. Tað er ikki víst, at tað verða fimm spælarar úr hvørjum felag til komandi venjingar, tí hevur okkurt felag fleiri evnaríkar spælarar, fær tað sjálvandi eisini fleiri spælarar við og hini færri.

Tær tríggjar fótbóltskvinnurnar halda, at tað hevði verið stuttligt, um kanska eisini onnur feløg tóku seg saman um líknandi venjingar, tí so kundu teir ymsu talentbólkarnir eitt nú spælt venjingardystir og havt onnur tiltøk saman.

*einslistir@kallnet.fo*